# Føroysk skip tvingað undir útlendskt flagg

**Tað fer at kosta nógvum føroyskum sjófólki størvini, at Skipara- og Navigatørfelagið nú hevur lýst verkfall á skipum í oljuvinnuni**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Thor í Hósvík er størsti føroyski reiðari í oljuvinnuni. Seinasta skipið, teir fingu í flotan, fer undir útlendskt flagg og tað er alt, sum talar fyri, at tey skipini, hjá felagnum, sum eru undir føroyskum flaggi, eisini fara undir útlendskt flagg nú, sigur reiðarin*

Nú fara tey føroysku skipini, sum sigla í oljuvinnuni undir útlendskt flagg.

Og skip, sum ætlanin fyri stuttum var at fáa undir føroyskt flagg, fara nú heldur undir útlendskt flagg ístaðin

Gunnbjørn Joensen á Thor í Hósvík sigur, at nú eru umstøðurnar hjá skipunum í oljuvinnuni undir føroyskum flaggi so vánaligar, at tað er onki at gera, uttan at koyra tey undir útlendskt flagg.

Hetta er ein beinleiðis avleiðing av krøvunum, sum Skipara- og Navigatørfelagið setir til reiðararnar, sum hava hesi skipini.

Ósemja er ímillum skipara- og Navigatørfelagið um lønina hjá yvirmonnunum á hesum skipunum og tað er so langt ímillum partarnar, at nú hevur felagið lýst verkfall fyri yvirmenninar umborð á teimum.

## Missa størv

Men tað skilst, at hetta kann gerast ein dyggur smeitur fyri teir føroyingar, sum høvdu ætlað sær eina framtíð í føroysku oljuvinnuni á sjónum.

Thor í Hósvík hevur sjey slík skip og er tískil størsti, føroyski reiðari á økinum.

Fýra av teirra skipum eru undir føroyskum flaggi og trý eru undir útlendskum flaggi. Tey sigla um allan heimin, eitt er beint sunnanfyri markið, tvey eru á norskum øki, eitt er í Persaraflógvanum, eitt er í Singapor og eitt er í Vesturafrika.

Umborð á einum skipi eru skiparin og stýrimaðurin føroyingar, og á einum øðrum skipi eru skiparin og meistarin føroyingar. Umborð á hinum fimm skipunum eru bara føroyingar.

– Ætlanin var at eitt skip afturat skuldi koma undir føroyskt flagg, men tað er ikki hugsingur um nú og tí fer tað at verða skrásett á San Vinsent. Tað er Thor Supporter.

Og tað er eisini alt, sum talar fyri, at tey skipini, sum eru undir føroyskum flaggi, eisini fara undir útlendskt flagg, tí sum umstøðurnar nú eru, ber ikki til at verða verandi undir føroyskum flaggi.

Gunnbjørn Joensen sigur, at enn er onki avgjørt, men tað er onki at ivast í, at samstundis, sum tey fara undir føroyskt flagg, fara tey eisini fara at verða mannað øðrvísi.

Tvs, at tey tey í størri mun enn nú fara at verða mannað við útlendingum og føroyingarnir umborð fara at vera slúsaðir íland.

– Tað er nóg trupult sum er at manna skipini við føroyingum, tí teir kosta 4.000 krónur eyka um mánaðin bara í ferðaútreiðslum fyri hvønn mann, hvørja ferð, teir skulu uttanlands, umframt ferðingartíðina.

Í lógini verður lagt upp til, at so nógv føroysk arbeiðsmegi sum gjørligt skal vera við í oljuvinnuni, men verða skipini noydd at fara undir útlendskt flagg, verður tað eitt stórt afturstig í so máta. Ikki minst verður tað eitt afturstig fyri tann serkunnleika, vit ætlaðu at byggja okkum upp í oljuvinnuni, sigur reiðarin úr Hósvík.

## Kunnu ikki kappast

Gunnbjørn Joensen sigur, at sum støðan er nú, er tað ber tað ikki til hjá føroyskum skipum í oljuvinnuni at kappast við útlendskt reiðarí.

Hann sigur, at lønirnar, sum teir hava umborð eru frammanundan á so høgum støði, at tær eru hægri enn lønirnar hjá navigatørunum á Brimli og Tjaldrinum, so hann skilir onki av krøvunum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum.

– Tað sær út sum um Skipara- og Navigatørfelagið hevur tikið tað besta úr teimum donsku sáttmálunum og tað besta úr teimum norsku sáttmálunum og lagt tey krøvini fyri føroysku reiðararnar.

– Tað halda vit er eitt ov nógv avgjørt, nú, vit eru í ferð við at byggja vinnuna upp. Vit hava brúkt milliónir av krónum uppá at læra manningarnar til hesa nýggju siglingina og tí er tað niðurbrótandi at fáa slík krøv.

– Men einaferð renna vit okkum upp undir loftið og tað síðsta tilboðið, vit hava givið teimum, er so gott, at tað er óskiljandi, at teir ikki taka av.

Tá ið skip fara undir útlendskt flagg, verður ofta hugsað um trygdina?

Trygdin hevur onki við fløggini at gera. Tað eru ikki fløggini, sum seta treytirnar, men reiðarin og ikki minst, oljufeløgini sjálvi. Og krøvini, sum oljufeløgini seta, eru mangan nógv strangari, enn krøvini, sum skipasýnini í teimum ymsu londunum seta. So trygdin verður framvegis sama støði sum nú, sama, hvørjum flaggi, tey eru undir, sigur Gunnbjørn Joensen.

Og hann leggur afturat, at tað skal rættiliga bógv broytast í Føroyum, áðrenn tey skipini, sum eru farin, og fara undir útlendskt flagg, flagga heimaftur.

Hann sigur eisini, at tað er ikki verri at hava útlendingarnir umborð, tað ræðir um at hava eina hóskandi blanding.

– Vit hildu, at vit kundu byggja eina vinnu upp í Føroyum á kappingarførum grundarlagið við útlendsk reiðarí. Men krøvini, sum Skipara- og Navigatørfelagið nú setur, hevur fingið okkum at ásanna, at tað ber ikki til, sigur Gunnbjørn Joensen.

Hann skoytir uppí, at tað er ongin munur á, hvar skipini eru skrásett.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Ellinti Abrahamsen, formanni í Skipara- og Navigatørfelagnum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Asfaltera stórt og smátt á Strondum

**Næsta ár ætlar Stranda Kommuna at asfaltera at kalla allar vegirnar í bygdini**

STRENDUR
*Áki Bertholdsen*



*Næsta ár skulu næstan allir vegir á Strondum asfalterast. Fyribils er ætlanin at brúka tvær milliónir næsta ár til afaltering í bygdini*

Næsta ár skulu allir vegir á Strondum gerast í fínasta stand.

Í løtuni er fíggjarætlanin fyri næsta ár til viðgerðar í bygdaráðnum. Og hóast hon ikki er endaliga samtykt, er tað greitt, at ein tann størsta útreiðslan hjá kommununi komandi ár, verður í asfaltering.

Eivind Jacobsen, borgarstjóri á Strondum, sigur, at fyribils eru tvær milliónir settar av á fíggjarætlanini hjá kommununi fyri komandi ár, til asfaltering.

Hann sigur, at hann hevur skilt á bygdaráðslimum, at er semja um, at taka eitt ordiligt tak at asfaltera næsta ár, so hann væntar ikki, at upphæddin verður stórvegis broytt.

Fyri hesa upphæddina er ætlanin at asfaltera at kalla allar vegir í Kommununi, bæði høvuðsveg og síðuvegir.

Ávís vegastrekki á Strondum eru í góðum standi, men tað mesta er í vánaligum standi og tí er ætlanin at asfaltera alt, sum treingir til.

Hann sigur, at tá ið farið verður at asfaltera, loysir tað seg nógv betri fyri kommununa at taka sum mest undir einum.

– Tað fær prísurin fyri hvønn fermetur munandi niður, um nógv verður lagt fyri, tí maskinur skulu flytast til og frá og riggast til undir øllum umstøðum, og tess minni tær verða brúktar, tess dýrari verður arbeiðið upp á seg.

Strandingar fáa vegirnir asfalteraðir fyri 100 krónur fermeturin, tvs, at fyri tvær milliónir kunnu einir 20.000 fermetrar av vegi asfalterast og tað er tað allarmesta av vegi, sum er í kommununi, sigur borgarstjórin.



# Hurlivasin tykist vera fullkomin

**Tað tykist einki skil at vera í Sjálvstýrisflokkinum í løtuni. Politiski formaðurin sigur, at alt gongur fínt. Landsnevndarformaðurin hevur tikið seg úr nevndini og boðað frá, at annar formaður er valdur. Men tann, sum skal vera valdur veit ikki av tí og noktar fyri, at so er**

HURLIVASI
*Edvard Joensen*



*Ronald Poulsen sigur seg ikki vera valdan til formann í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins, hóast fráfarandi landsnevndarformaðurin sigur tað. Men hann sigur eisini, at um hann verður valdur, er hann ikki bangin fyri at taka við*

Í Sjálvstýrisflokkinum tykjast tey hvørki at vita út ella inn. Ein letur væl at, meðan annar heldur, at tað gongur illa. Tann triði vil einki siga, og tann fjórði veit ikki av, at hann er formaður í landsnevndini. Hurlivasin tykist fullkomin.

Sjálvsdtýrisflokkurin hevði fund hóskvøldið, har tosast skuldi um støðuna í flokkinum sum heild og um fólkatingsvalið serliga. Men niðurstøða var eingin onnur gjørd, enn at fundur skal vera aftur í næstu viku, sigur Sámal Petur í Grund, politiskur formaður i Sjálvstýrisflokkinum.

Edvard Hermansen, landsnevndarformaður í flokkinum, sigur hinvegin, at hann hevur lagt frá sær sum landsnevndarformaður og tikið seg úr landsnevndini. Í hansara stað er Ronald Poulsen valdur, sigur hann.

Men tí veit Ronald Poulsen als ikki av, sigur hann við Sosialin. Hann varð skotin upp, váttar hann, men vildi ikki taka við, fyrr enn hann hevði umhugsað støðuna og tosað við baklandið. Tað er valfelag sítt í Suðurstreymoy.

Tað hevur ikki borið til at fingið viðmerkingar frá løgtingsumboðunum, Helenu Dam á Neystabø ella Kára Højgaard. Kári Højgaard hevur ikki verið at hitta, meðan Helena Dam á Neystabø púra ber seg undan at koma við viðmerkingum til støðuna.

## Ov bíligt

Edvard Hermansen í Hósvík, sum hevur verið landsnevndarformaður í Sjálvstýrisflokkinum, sigur, at tað er ov bíligt av formanninum, Sámali Peturi í Grund, at skjóta skuldina á tað vanlukkuliga valúrslitið á síni persónligu viðurskifti.

– Tað vísir bara, at hann er als ikki búgvin politikari, sigur Edvard Hermansen.

Hann er onga løtu í iva um, at tað er stríðið innanflokks, sum er orsøkin, og at formaðurin hevur ikki megnað at rikið ein líkinda politikk, sum fólk skilja.

Tá hann ikki klárar tað, eigur hann at taka seg aftur. Í grundini átti hann ongantíð at hildið seg framat, heldur fráfarni landsnevndarformaðurin.

Edvard Hermansen ásannar, at hann sjálvur hevur ikki fingið síni sjónarmið nóg væl ígjøgnum í flokkinum, og tí tekur hann nú avleiðingarnar av. Hann hevur lagt frá sær sum landsnevndarformaður, sigur hann, og tikið seg úr landsnevndini.

Tiltakslimurin í Norðurstreymoy skuldi so tikið við, men ger tað ikki. Viðkomandi noktar beinleiðis at taka við sessinum, sigur Edvard Hermansen. So aftur har er ein óvanlig støða, sum flokkurin má fáa greidda.

Sámal Petur í Grund svarar, at tað kann so ikki kastast honum fyri, at politikkur Sjálvstýrisfloksins ikki er komin út millum fólk. Hann hevur sitið so stutt sum formaður, at er tað nakar formaður, sum ikki hevur fingið boðskap floksins út, má tað vera tann fyrrverandi.

## Veit einki

Edvard Hermansen sigur, at Ronald Poulsen í Havn hevur tikið við sum landsnevndarformaður. Men Ronald Poulsen sigur, at tí veit hann als ikki av.

Sambært fyrrverandi landsnevndarformanninum var tað valið avgreitt á fundinum, sum hildin varð hóskvøldið. Men tað avsanna bæði Ronald Poulsen og Sámal Petur í Grund. Teir siga, at fundurin varð niðurlagdur, og skal takast upp aftur í næstu viku. Sambært Ronaldi Poulsen skal tað vera týskvøldið.

Sámal Petur í Grund, formaður, sigur at tað hann veit, hevur landsnevndin ikki skipað seg eftir eykaaðalfundin í Klaksvík. Edvard Hermansen hevur virkað sum formaður, tí hann var formaður áðrenn aðalfundin. Tá hann nú leggur frá sær, má so næstformaðurin automatiskt taka við, heldur Sámal Petur í Grund. Og so vítt Sámal Petur í Grund veit, eitur næstformaðurin Jan Joensen og er úr Klaksvík.

Ronald Poulsen sigur, at tað er rætt, at hann var í uppskoti á fundinum hóskvøldið at gerast nýggjur landsnevndarformaður. Men hann tók ikki av beinanveg, men vildi tosa við baklandið fyrst, og so boða frá støðu síni á fundinum, sum verða skal týskvøldið.

## Persónsstríð

Sámal Petur í Grund er ikki í iva um, at tað er persónsstríð, sum er orsøkin til støðuna í Sjálvsstýrisflokkinum í dag.

– Tað verður ikki tolt, at ávísir persónar ikki ráða einsamallir, sigur hann.

Sjálvur noktar hann fyri at hava trokað seg fram at og rikið nakran úr nøkrum sessi.

– Eg stillaði bara upp eftir tí stevnuskrá, sum flokkurin hevur. Men summi fólk tola ikki, at onnur koma teimum ov nær, er hansara viðmerking.

Ronald Poulsen hevur somu turru viðmerking til tað, sum ført verður fram um, at hann er vorðin formaður í landsnevndini.

– Summi fólk klára ikki, at onnur hava aðra meining, enn tey sjálv halda vera ta røttu, sigur hann við greiðari adressu til fráfarandi landsnevndarformannin í Sjálvstýrisflokkinum.

Tað, sum hendir í Sjálvstýrisflokkinum í dag er eitt harðligt persónsstríð, sum er íkomið av berari maktgirnd, sigur ronald Poulsen, landsnevndarlimur í Sjálvstýrisflokkinum.

## Kyrra

Ronald Poulsen váttar tó, at hann hevur einki í móti at taka við sum landsnevndarformaður. Tað hevur hann verið fyrr, sigur hann, og torir væl at taka tað á seg aftur.

Um so verður, verður hansara størsta uppgáva at fáa kyrru aftur í flokkin, sigur hann. Hann vil fara hóvliga fram. Reka tann kenda stig fyri stig politikkin hjá flokkinum.

– Brúk er fyri eini greiðari politiskari stevnu. Men tað kemur einki boð upp á alternativan politikk, so leingi hart og opið stríð er innanflokks, sigur Ronald Poulsen, sum eftir øllum at døma ætlar sær at taka av at gerast landsnevndarformaður í Sjálvstýrisflokkinum í næstu viku.

Sámal Petur í Grund sigur, at so leingi botnviðurskiftini ikki eru í lagi, fæst kyrra ikki. Tí skal botnurin reinsast, sigur hann.

– Standi eg í vegin fyri eini loysn í Sjálvstýrisflokkinum, má eg so taka avleiðingarnar av tí, sigur Sámal Petur í Grund, formaður í Sjálvstýrisflokkinum.

# Vil skifta formannin út

**Fyrrverandi landsnevndarlimurin í Sjálvstýrisflokkinum vil hava Eyðun Elttør, landsstýrismann, til politiskan formann**

FLOKKSSTRÍÐ
*Edvard Joensen*

Á landsnevndarfundi í Sjálvsstýrisflokkinum hevur Edvard Hermansen, fyrrverandi landsnevndarformaður, biðið Sámal Petur í Grund, víkja formanssætið og lata Eyðun Elttør taka við.

Edvard Hermansen sigur í tíðindaskrivi, at hann metir, at floksformaðurin hevur skuldina av vánaliga valúrslitinum, flokkurin fekk til fólkatingsvalið. Hann vísir á, at fólkið hevur talað, men fyri deyvum oyrum, sum hann eisini hevur gjørt vart við á landsnevndarfundinum hóskvøldið.

Sámal Petur í Grund svaraði aftur á fundinum, at hann ikki helt seg einsamallan kunna taka ábyrgdina av valósigrinum og klandrinum í flokkinum. Hann heldur at leikluturin hjá Edvardi Hermansen sjálvum er alt annað enn lítil.

Sámal Petur í Grund vísti á fundinum á, at Edvard Hermansen hevði úttalað seg til fjølmiðlarnar, og at tað bara hevði økt um stríðið. Edvard Hermansen hinvegin sigur seg ikki hava gjørt annað enn svarað upp á spurningar, hann hevur fingið frá fjølmiðlunum um støðuna í flokkinum.

Edvard Hermansen sigur í tíðindaskrivinum, at eftir at Ronald Poulsen var valdur til formann í landsnevndini, valdi hann sjálvur at taka seg heilt úr nevndini. Hetta kom heldur óvæntað á fundarluttakararnar, sigur hann, og tí varð fundurin niðurlagdur. Hann kann ikki góðtaka, at málið ongar avleiðingar fær, og fer tí frá. Sjálvur hevði hann hildið tað verið rættari, at politiski formaðurin legði frá sær.

Stóri taparin á fólkatingsvalinum, Sámal Petur í Grund, stendur nú sum vinnari í einum syndraður Sjálvsstýrisflokki, har støðan er fullkomin ruðulleiki, skrællið størri og sárini djúpari, skrivar Edvard Hermansen í tíðindaskrivinum.